# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

# Grøn hárfríðkan í Føroyum

Móttøka var á Salong Madonna í Havn mikudagin í síðstu viku, í sambandi við at bæði Salong Madonna og Salong Hárvist í Miðvági fingu handað diplom sum grønar salongir.

Tað var Heðin Mortensen, borgarstjóri í Tórshavnar kommunu, sum handaði diplomini til ávikavist Karin Joensen frá Hárvist og Súsannu Køtlum frá Salong Madonna.

Eftir at hava fyrireikað seg til at gerast grønar salongir, eru tær báðar salongirnar nú góðkendar. Fyri at kunna gerast grønar salongir skulu salongirnar fylgja nøkrum ávísum krøvum.

Í sambandi við hesar góðkenningar hongur eitt grønt merki í báðum salongunum, har tað stendur, at arbeitt verður miðvíst fyri at fara væl um bæði arbeiðsumhvørvið og umhvørvið annars.

Bæði leiðsla og starvsfólk hava verið á skeiði í Danmark og nomið sær kunnleika um kemisku evnini innan hárviðgerð, eins og tey hava lært at nýta nýggjastu tøknina á økinum.

*mg*




*Karin Joensen frá Hárvist og Súsannu Køtlum frá Salong Madonna saman við Heðini Mortensen, borgarstjóri í Tórshavnar kommunu, sum handaði diplomini*



*Súsanna Køtlum frá Salong Madonna saman við starvsfólkunum Jonu Joensen, Súsannu Jøkladal og Marin Johannesen*




*Birgit Beder og Karin Joensen frá Hárvist í Miðvági*

## Merkisdagar

**45 og 50 ára føðingardagur**
Í sambandi við at vit í mars og apríl fylla 45 og 50 ár, halda vit felags føðingardag í Eydnuni á Oyrarbakka 10. apríl kl. 18. Tey ið ynskja at gleða okkum við at koma, verða biðin at boða frá á tlf. 422165 ella 226623 innan 25. mars. Heilsan Halljón og Elsa Annika Norðskála.

**60 ára føðingardagur**
Mikudagin 7. apríl 2010 verði eg 60 ár, føðingardagsveitslan verður hildin í Skálanum í Klaksvík, leygardagin, 10. apríl kl. 19. Tey sum ynskja at gleða meg við at koma í føðingardag, verða vinarliga biðin at boða frá við at ringja ella senda sms til telefon 211988, ella við t-posti til isak@football.fo helst áðrenn 5. apríl. Heilsan Ísak Mikladal, Klaksvík.

**75 ára føðingardagur**
10. mars fyllur Torleif Matras, Fosságøta 7, Klaksvík, 75 ár. Dagurin verður hildin saman við familjuni.

**80 ára føðingardagur**
11. mars verður Thora Magnussen Tjørnuvík 80 ár. Dagurin verður hildin 12. mars kl. 18 í bygdarhúsinum í Tjørnuvík. Øll eru hjataliga vælkomin.

**Silvurbrúdleyp**
Týsdagin 23. mars hava Heidi og Jan Abrahamsen á Strondum silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin í Kelduni frá kl. 17. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Brúdleyp**
Tann 27. mars kl. 12 giftast í Kelduni í Skálafirði, Levi Tróndarson Nybo, Hvítanes og Birita Ingolfsdóttir Heinesen, Norðagøtu. Døgurði verður fyri innbodnum kl. 16. Opið hús verður kl. 21 í Oasuni, Kirkjustrætið 4, Hoyvík, har øll eru hjartaliga vælkomin at heilsa uppá brúðarparið.

**Brúdleyp**
Leygardagin 27. mars giftast Linda Ziska Jacobsen, Tórshavn og Gunleif Lyngvej Poulsen, Sandvík. Vígslan verður í Havnar kirkju kl. 11. Móttøkan verður í Miðlahúsinum í Tórshavn frá kl. 13-15.30. Øll eru hjartaliga vælkomin.



**Brúdleyp**
Páskadag 4. apríl giftast í Thyregod Kirke Súsanna Joensen frá Svínoy og Kim Gotsæd. Tey ið ynskja at gleða okkum við at koma í brúðleyp, biðast vinarliga siga frá á tlf: 0045 26535429 áðrenn mánadagin 15. mars.

**Brúdleyp**
Leygardagin 24. apríl giftast Joan Simonsen, Saltangará og Rúni Jallson Niclassen, Skáli. Vígslan verður í Glyvra kirkju kl. 14. Veitslan verður í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19. Tey, ið ynskja at gleða Brúðarparið við at koma, verða vinarliga biðin um at tekna seg innan 10. apríl á tlf. 262713, 448051 (Joan) ella 256043, 441603 (Rúni).

## Tøkk



Eina hjartans tøkk skulu tit øll hava, sum gjørdu okkum diamantsbrúdleypsdagin sera hugnaligan.
Stóra tøkk skulu eisini tit hava, sum sendu blómur, gávur og á annan hátt minstust okkum.
Tøkk fyri ein ógloymandi dag.

**Blíðar heilsanir**
**Hanna og Eirik Justinussen**

†

## Andlát og jarðarferðir

**Trond Mouritz Erlingsson, ættaður úr Fámjin, búsitandi í Svendborg**, andaðist á Svendborg Sjúkrahúsi 5. mars, 82 ára gamal. Jarðarferðin verður úr Fredens Kirke í Svendborg hósdagin kl. 14.

**Dagurin**

10. mars. Eðla. Einki halgimenni er við hesum navni, men sipað verður kanska til enska abbadissu Sanktu Etelredu, sum doyði 10. mars í 626.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*